# Tak orðabókapolitikkin til nýggja viðgerð



KÁRI DAVIDSEN

**Innilig áheitan á Kristinu Háfoss, landstýriskvinna í mentamálum um at taka allan orðbókapolitikkin, sum liggur í skeljasori upp til nýggja viðgerð**

Hesa seinastu tíðina havi eg í eini greinarøð, sum bert fekk innivist í øðrum av teim stóru bløðunum, Sosialinum, gjørt vart við ta vanlagnu, sum orðabókapolitikkurin hevur verið fyri av ymsum orsøkum. Men høvuðsorsøkin til hesa greinarøð var eitt skriv t. 07. januar 2008 frá Mentamálaráðnum, har Alda Joensen legði meg undir at vera tvørballið, ið ikki var til at flættast við, við orðunum: "Samráðingar hava verið við Mentamálaráðið av fyrstan tíð júst um at keypa handritið. Av tí at Mentamálaráðið onga semju fekk við tygum um málið, varð avrátt, at Orðabókagrunnurin skuldi taka um endan og gera semju um verkætlanina. …… 2) "Samráðingar, ið tygum hava við Orðabókagrunnin, snúgva seg jú eisini um keyp av lidnum handriti." Tað, sum Alda skrivar um at keypa handritið og keyp av lidnum handriti var ikki innihaldið í skrivinum, men tað, sum málið snúði seg um, var útgáva av mínum orðabókahandriti, og her hevur Alda so vavt alt málið upp í ein ellubita, tí tað, sum stendur í "Fráboðan 02. mai 2001" er m.a. hetta: "Sagt verður frá, at Mentamálastýrið hevur viðgjørt umsókn tygara um stuðul til **útgávu av týsk-føroysku orðabók**, og hevur gjørt av at stuðla tiltakinum við **kr. 470.000**." "Peningur er til **liðugtgerð og útgávu av týsk-føroysku** orðabókini." Alda Joensen, hetta er tað, sum stendur orðarætt í fráboðani frá Mentamálaráðnum, útgáva og liðugtgerð, og ikki ikki fyri at gera eina orðabók, men at tú ikki megnar at lesa skriv frá tykkum sjálvum, kann verða katastrofalt í sambandi við umsóknir, tí mentamálaráðharrar og møguligar stjórar hava nú beinleiðis skeivt grundarlag at meta um umsóknirnar, sum tú hevur skimmað leysliga ígøgnum, tí tú hevur lisið ein boðskap inn í skjalið, sum ikki stendur í upprunaskjalinum. Er hetta við vilja, grov manipulasjón av innihaldinum í upprunaskjalinum, ómegd frá tínari, ella hevur onkur stjóri noytt teg at skriva hetta?

Hesi 10 seinastu árini hevur Tjóðveldisflokkurin nú Tjóðveldi átt 6 mentamálaráðharrar: Signar á Brúnni, Annlis Bjarkhamar, Tórbjørn Jacobsen, Óla Holm, Høgna Hoydal, Anitu á Fríðriksmørk (raðfylgjan er tilvildarlig), Jógvan á Lakjuni, fólkaflokkurin, sum sat samfull 4 ár frá 2004-2008, og loksins Kristina Háfoss ert tú nr. 7 landstýriskvinna í mentamálum í Tjóðveldi, t.v.s., at frá 1998 til 2008 hava 7 mentamálaráðharrar av 8 verið úr Tjóðveldi. Tórbjørn Jacobsen er tann einasti, sum kann vísa á eina alneyðuga orðabók fyri 1.600.000 kr. Hvønn teirra velur tú sum fyrimynd? Ynskir tú, at ein varði á orðabókaøkinum skal liggja eftir teg, tá tú ert farin úr starvi. Tobbi dugdi og tordi, eftir hann liggur Føroysk-enskt orðabók.

Mentamálaráðið við Tórbirni Jacobsen sum mentamálaráðharra játtaði 470.000 kr til orðabókaútgávu, sum eg valdi ikki at taka ímóti, tí samsýningin fyri orðabókahandritið heldur ikki tá var ikki fingin upp á pláss. Neyvan man vera tað vera vanlig mannagongd at lata bát fara av bakkastokki og síðan at smíða hann. Men Óli Holm fekk óivað tett okkurt holið eftir ráðum frá onkrum innanhýsis stjóra sum ráðgeva í Mentamálaráðnum

Tí fari eg at heita á teg, Kristinu Háfoss, mentamálaráðharra: Ger tær tann ómak og les grein hjá Bjarna Djurholm í Dimmu t. 22. februar 1997, fyrispurningin hjá Bjarna Djurholm 9. februar 1997 (løgtingsmál nr. 45/96), og svarið frá Signari á Brúnni upp á fyrispurningin hjá BD í sama løgtingsmáli. Her fært tú greitt innlit í orðabókamálið, soleiðis sum tað lá fyri 10 árum síðan, og var tað ikki fyri tey bæði privatu forøgini, Stiðjan og Sprotan, so hevði støðan verið syndarlig!

Í Dimmu t. 25. apríl skrivar Herman Oskarson (= HO) hesi orðini: "Politikkur hevur forkomið okkum framdriftina hesi seinastu 10 árini og so guðsdoy 10 tey komandi eisini!" Við lítlari broyting snikki HO'sa orð soleiðis, at tey hóska til míni viðurskifti: " Orðabókapolitikkur hevur forkomið okkum framdriftina í orðabókum hesi seinastu 10 árini - og so gudsdoy 10 tey komandi eisini!" um hildið verður fram við somu manning og mannagongdum, tí Polo er við at kollsiga í verbalari vælvild – men dyggum dugnaloysi. So Kristina Háfoss, landstýriskvinna í mentamálum, tú eigur byrjanina av teimum næstu 10 árunum og avgerðin er tín!

**Time out**

Kristina Háfoss, landstýriskvinna í mentamálum, her nýti eg myndamál úr ítróttarheiminum: **Time out** fyri orðabøkur. Hetta ítróttarhugtak verður mangan nýtt, tá tað gongst av skriðuni hjá einum liði, og tað er júst tað, ið tað ger á orðabókamótinum. Her er komin stígur í arbeiðið vegna manglandi førleika, idealismu, embætis- ella valdsmisnýtslu. Fleiri orðabókahandrit liggja í hálvagekki (Orðabókagrunnurin liggur inni við orðabókahandritum fyri meira enn 5 milljónir), samla støv og aveldast. Tær koma ikki brúkaranum til gangs, serliga okkara ungdómi.

Nøkur øki, sum tú kanst taka upp til viðgerðar, eru td. 1) **Reglugerðir og mannagondir**, sum Høgni Hoydal, Jóhan Petur Hentze og Signar á Brúnni hava umrøtt, men aðalstjórar og deildarstórar látast ikki um vón, tí hygg at svari upp á fyrispurning frá Jenis av Rana, har Mentamálaráðið svarar undir pkt 3: " **Ad. 3**: Vanlig mannagongd er, at Mentamálaráðið fær umsóknir frá høvundum ella forløgum, og tað stendur øllum í boði at søkja um stuðning til orðabókagerð. Tað er ein vanlig fortreyt, at umsóknin verður latin inn, áðrenn verkætlanin byrjar. Hinvegin er einki til hindurs fyri, at stuðningur verður útgoldin til liðugt orðabókahandrit, um høvundur ella forlag ynskir hetta, og handritið annars lýkur grundleggjandi faklig krøv." (Undirstrikað av mær). Spyr aðalstjóran, Petur Petersen ella fráfarna deildarleiðaran, Jóannes Dalsgaard, ella mín sann eisini núverandi deildarleiðara, Martin Næs, sum heldur ikki ynskir, at mín orðabók skal fáa somu sømdir sum Ulf Timmermann (200) og Johnny Thomsen (2001) , sum hava fingið ávikavist 1,89 og 1,9 milljónir fyri væl minni orðabøkurbøkur enn mína, og sum til denna dag ikki eru komnar undan kavi enn. Hví hava hesir stjórar ikki nýtt tann seinna partin av **Ad. 3** í mínum føri? Hvørji munnu argumentini vera? Hvaðan er hetta stýrt? Mentamálaráðharrarnir skifta, men aðal- og deildarstjórar eru teir somu. Bjarni Djurholm hevði sína 2) **raðfylgju av orðabókum** í 1997, men tú kanst nýta hesa niðanfyri, har nakrar nú hava sæð dagsins ljós, tær flestu komnar frá privatum forløgum, Stiðjanum og Sprotanum + Samheitaorðabókin, meðan Orðabókagrunnurin hesi seinastu mongu árini lítið og einki hevur formátt sær, og sum ætlar sær undir nýggja Dansk-føroyska orðabók afturat, so at vit hava tríggjar av slagnum. Hvør hevur vitað so skaft?!.

- ensk-føroyska orðabók 1992 og 2008
- donsk-føroysk orðabók 1998
- týsk-føroyska orðabók,
- fransk-føroyska orðabók,
- sponsk-føroysk orðabók og russisk-føroysk???
- føroysk-ensk orðabók 2005 og 2008
- føroysk-donsk orðabók???
- føroysk- týsk orðabók???
- føroysk-fransk orðabók
- føroysk-sponsk orðabók og føroysk-russisk orðabók

Aðrar orðabøkur eru: Móðurmálsorðabókin 1991-1998, Føroysk-italsk orðabók 2004 og Íslendsk-føroysk orðabók 2006

**3)** Tað minsta kravið, ið Løgtingið kann og skal seta, er, at tað er nøkulunda samsvar millum játtan og úrslit, sum als ikki er støðan í dag vegna tvørrandi vanstýring frá Mentamálastýrinum. Tí er vandi fyri, at Løgtingið fer at seta krøv um úrslit fyri játtaðan skattapening. Aftur í ár, hevur Mentamálaráðið fingið tillutað 940.000 kr til orðabókagerð. Hvat man Martin Næs fara at nýta hesa upphædd til, sum vónandi fer til orðabókagerð, sum hon upprunaliga er oyramerkt til frá Løgtingsins síðu, tí tað munnu ikki vera nógvar orðabókaverkætlanir í gerð í løtuni, kanska er onkur parlørur, orðabókasnøkil, settur í gongd av Orðabókagrunninum við vælsignilsi frá Mentamálaráðnum.

Jenis av Rana set tín fyrispurning um orðabókapolitikkin fram aftur sum skjótast!

**4) Minka um óneyðugar instansir** í orðabókagerð og orðabókaútgávu, t.d. er eingin fremmandamálsfrøðingur hvørki í Orðabókagrunninum, Mentamálaráðnum ella nú í uppskoti í seinastuni í Málnevndini. Heldur tú, at sjúkrahússtjórin hevði sett ein slaktara úr SMS, FK ella aðrari fyritøku á hjartadeildina, um verkfall var á sjúkrahúsinum? Skurðlæknar duga síni ting, og tað gera slaktarar eisini, men kortini hvør á sínum øki. Soleiðis er eisini við fremmandamálsorðabókum, tær krevja sínar serfrøðingar!

**5) Hvussu ber tað til, at Orðabókagrunnurin fær øll orðabókahandrit fyri einki**, og skal fáa allar inntøkurnar fyri tær bøkur, sum verða seldar, meðan tað privata forlagið ikki fær boðið nakað orðabókahandrit. Hetta arbeiðslagið hjá Mentamálaráðnum er kappingaravlagandi – og tað við lít. Hví ikki bjóða hvørt handrit út til tann, sum megnar at fáa tað avgreitt bæði skjótt, væl og tøkniliga best?

**6)** Bjarni Djurholm skjeyt í 1997 upp **at seta ein samskipara á hetta økið**, sum er sera skilagott. Hesin kundi so sitið fyribils í eini 5 ár og fingið skil á hetta misrøkta økið í skjótt 10 ár. Hetta skuldi verið bæði á tí fíggjarliga økinum, planleggingarøkinum og útgávuøkinum. Hesin persónur kundi so verið undir tínum málsøki ella einum øðrum uttanveltaðum stovni við ábyrgd yvir fyri Løgtingi.

Skal eg tora at bjóða meg fram til hetta starv?!

Arnstein Nicklasen skrivar t. 25 mars 2007 eina grein í Dimmu, har hann m.a. vísir á eitt serligt fyribrigdi í tí føroyska samfegnanum: "… Ella sita leiðarar í dag bara kúrrir og krúpa og royna at yvirliva ein dag í senn, eina viku kanska, ella henda mánaðin at enda? Ger nakar teirra ein vørr fyri sakini longur?

Ella er alt blivin ein gráur greytur av yvirlivarum? Ongin skipari á Polo. Hvør er – og hvar eru – eitt nú lokomotivini í Tinganesi…" Íslandi verða avgerðir tiknar, sigur Gunnvá Balle, og eru tær skeivar, so verða tær broyttar, men her á hesum lítla øki rekur Polo fyri vág og vind. So Kristina Háfoss, landstýriskvinna í mentamálum, tú kanst verða tað nýggja lokomotivið í hesum sorgarleiki við tað, at tú torir at taka alt orðabókabókamálið upp til nýggja viðgerð og møguliga kallar avvarðandi partar í málinum til fundar.

Tú hevur grein í Sosialinum d. 28. apríl 2008, har tú vísir á: "Átøk, ið síggjast aftur í ár og komandi ár eru fylgjandi:" Eg kundi hugsað mær, at henda grein upprunaliga er skrivað "MPP" av embætisfólki. Tí seti eg tær henda spurning: "Hvussu ber tað til, at orðabøkur ikki verða grettar við einum orði í hesi drúgvu grein, sum fyllir eina heila blaðsíðu. Man tað ikki vera við vilja, tí Mentamálaráðið er dumpað so dyggiliga á hesum øki. Tí tú skrivar seinni í greinini: "Mál okkara er mest týðandi parturin av samleika okkara. Vit vita tó, at nútíðartøknin og samskiftið við umheimin ger, at útlendskt mál gerst alsamt størri partur av dagliga málinum í Føroyum. Tað hevur tí alstóran týdning, at vit gera tað vit kunnu fyri at geva føroyska málinum at mennast í,…" Men hetta hevur ikki verið veruleikin til í dag, tá ið vit hugsa um orðabøkur. 10 ár eru liðin, og vit eru langt frá komin á mál. Tú letst í orðum at vilja málinum væl, men sýn eisini í verki, at álvari er aftan fyri orðini. Sum kvinna ger ein vørr á hesum øki, vís, at tú vilt, dugir og torir at seta sjøtul á hetta upptak, tí upptak verður. Tobbi gjørdi tað á sinni.

Eg havi bert í hesum greinastubbum roynt at víst á mín variant í hesum fyribrigdi. Arnstein heldur áfram í somu grein: "Og hvussu nógv hetta kommersið hevur kostað í ómakslønum, fundarpeningi, og óneyðugari brúktari tíð, tað spyr bara eingin um – Í grein 9 vísti eg á, at orðabókapolitikkurin hevur kostað samfullar 11 - ellivu - milljónir". Kristina Háfoss, landstýriskvinna í mentamálum, tú kanst nú gera munin, nýt tíu time out, snara Polo á, og legg á annan bógv, tí henda ørvitisleið, sum hon hevur hildið hesi seinastu 10 árini, gongur ikki longur – ella vilt tú tað?

Nú havi eg bíðað í 10 ár og runnið á fundir hjá tvíbeintum fjallskipanum av leiðarum, millumleiðarum og sjálvgjørdum leiðarum, men enn er einki komið burturúr. So Kristina Háfoss, landstýriskvinna í mentamálum, hvønn vegin sparkar tú bóltin, verður tað aftur sjálvmál í tíni tíð sum mentamálaráðharri?

Spurdi nakað blað eftir einari syrgiligari søgu, sum hevur kostað føroyska skattgjaldaranum fleiri milljónir! Tað rætta talið eru 11 milljónir. Tann minni parturin hevur borið ávøkstur, men meginparturin er tó goldin av tí føroyska skattgjaldaranum, sum man hava krav upp á at fáa nakað fyri sín dýrt goldna skatt. Man henda søgan fara at vera tann einasta og seinasta?

Eg spyrji bara, man nakar av teimum beinleiðis og óbeinleiðis umrøddu persónum í hesum greinum fara at gera vart við seg? Bert ein samstarvsfelagi, sum nú fer frá fyri aldur, hevur sýnt orðabókamálinum málinum áhuga og stuðlað hesari orðabókini. Ikki ein fólkaskúlalærari, faklærari, starvsfelagi, miðnámsskúlalærari ella hægri hava fest stavin á blað um tørvin á orðabókum, ella um vit yvirhøvur skulu hava tær. Man tað vera tí, at vit innast inni kortini ynskja "Reyðu orðabøkurnar". Tað er so ómaksleyst at elta onnur, bara lúsin er fremmand?! Men lýsingar á føroyskum eru nú ásettar við lóg, nær man ein lóg koma á hesum øki, Høgni Hoydal?

Men Kári á Rógvi skal fáa tann heiður, at hann svaraði, um enn í sinnismuni, og tí gjørdist svar hansara, sum tað gjørdist. Hann átti heldur at vent kanónini niðan í Mentamálaráðið, tí har liggur okkara felags meinbogi! Men hann hevur nú ein góðan pall at gera vart við orðabókamálið sum formaður í Orðabókagrunninum – Løgtingsins røðarapall!

Lat orðini hjá Dorit Hansen í grein "Orðabøkur drukna í Mentamálaráðnum" í Sosialinum d. 04. septemur 2007 vera tey seinastu á hesum sinni: Føroyar hava ongan orðabókapolitikk, og orðabøkur eru tí bundnar at ósjálvsøknum einstaklingum. Samstundis druknar almennur stuðul til orðabókagerð í embætisverkinum í Mentamálaráðnum. Hetta halda bæði Kári á Rógvi, formaður í Orðabókagrunninum og Kári Davidsen, orðabókarithøvundur"

Ein tøkk til Sosialin, sum hevur tikið mína greinarøð við, men sum Dimma hevur sensurerað burtur við grundgevingini: Men grundin til, at greinarnar hjá tær ikki komu í blaðið, er tann, at tær eisini stóðu í Sosialinum…"